




*Í staðin fyri at landa skip og bátar, fer P/F Snodd nú – í samstarvi við Landingarmiðstøðina hjá Fiskamarknaði Føroya – burtur av at leggja seg eftir at pakka fisk*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

teir serligu tørvir, sum seljarar og keyparar hava.

### Tæna øllum pørtum

Hann sigur, at økta tænastan eitt nú skal skapa møguleikar fyri skiljing í fleiri støddir, soleiðis at viðskiftafólku skulu kunnu fáa tað, tey vilja hava.

- Ein slík tænasta tænir bæði teimum, sum flyta feskan fisk av landinum, men eisini teimum virkjum í Føroyum, sum ynskja at arbeiða ávís fiskasløg – og ikki minst ávísar støddir av fiski.

Kristian Fríðrik ásannar, at keyparar stundum hava havt fleiri ynskir, enn feløgini hava kunnað gingið á møti.

- Nú vilja vit brúka orkuna og førleikan betri, soleiðis at meira kann fáast burtur úr – viðskiftafólkunum og okkum øllum at gagni.

Hann heldur, at tað týdningarmesta er, at tvey feløg, sum hava líknandi funktiónir – undir liðini á hvørjum øðrum - ikki drepa hvørt annað, men heldur í samstarvi kunnu veita eina betri tænastu og harvið tjena pening, sum er neyðugt, um virksemið skal vera varandi.

### Útróðrarfiskurin

Vit spurdu eisini Kristian Fríðrik Olsen, um hann væntar, at útróðrarfiskurin kanska fær eina sterkari støðu á marknaðinum, nú feløgini eru gingin saman um samstarv.

Hann gevur okkum rætt í, at útróðrarfiskurin er vorðin "det sorte får" í skipanini, men hann sigur seg vóna, at eisini útróðrarfiskurin kemur at fáa nakað burtur úr hesum.

- Útróðrarfiskurin er vorðin nógv betur við tíðini. Menn gera meira burtur úr við at hava góðan fisk – og toskurin er sum so eingin trupulleiki. Trupulleikin er serliga hýsan, sigur hann.

Kristian Fríðrik Olsen sigur, at tann góði útróðrarfiskurin skuldi verið flokkaður fyri seg, soleiðis at teir, sum hava góðan fisk, fáa meira fyri sína veiði.

- Tað skal loysa seg at gera eitt gott arbeiði – eisini hjá útróðrarmonnunum. Hetta eigur sjálvsagt at síggjast aftur í prísinum, leggur hann aftrat.



*- Endamálið við samstarvsavtaluni millum Landingarmiðstøðina og Snodd er at veita seljarum og keyparum eina betri tænastu. Tað er betri at samstarva og fáa nakað burtur úr einum góðum samstarvi - enn at drepa hvønn annan, sigur Kristian Fríðrik Olsen, stjóri á Landingarmiðstøðini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Sterk bilasøla

Hóast talan í fjør var um eina niðurgongd upp á eini 20% fyri bilasølurnar kring landið, so tykist hetta ikki hava skalað Berg Motors.

Virkið hjá Johannes Berg, sum er eitt hitt størsta av sínum slag í landinum, hevði í fjør eitt úrslit á 4.115 tkr. eftir skatt. Hetta eru 878 tkr. lakari enn úrslitið fyri 2003, men verður serliga gongdin hjá bilasølum í Føroyum havd í huga, so má kortini sigast, at talan er um nøktandi úrslit. Frá seinnapartin av 90'unum og fram til 2003 hevði føroyska bilparkin ein óvanliga stóran tørv á endurnýggjan, og tað ávirkaði eisini talið av seldum bilum. Nú verður mett, at bilasølan er komin í eina meira náttúrliga legu.

Eginpeningurin hjá Berg Motors er nú 24.175 tkr. 20 fólk starvast hjá fyritøkuni.

**-jm**

## Pengar í leikunum

Sp/f Aspo, sum er felagið handan BR-leikur í Føroyum, hevði aftur í fjør eitt hampuligt avlop í roknskapinum. Talan gjørdist um eitt úrslit á 1.467 tkr., sum er ein minking upp á 460 tkr. sammett við árið fyri.

Leiðslan fyri felagið hevur ikki nakra ársfrágreiðing við í almenna roknskapinum, men tað skerst ikki burtur, at talan er um eina væl konsolideraða fyritøku. Eginpeningur felagsins er 9.358 tkr., og sæð burtur frá smávegis skuld til ognarar umframt mvg og skatt, hvílur eingin skuld á felagnum. Seks fólk starvast á BR-leikum.

**-jm**